UTTAN ÚR HEIMI

## Onga ávirkan á búskapin

Tey serkønu vænta ikki, at ósemjan um ES-grundlógina ella yvirgangurin í London fáa nakra ávirkan á búskapargongdina í Evropa.

Ein spurnarkanning vísir, at í Niðurlondum, Svøríki, Bretlandi, Danmark og Italia verður gongdin sum mett, og í Noregi og Spania verður búskaparvøksturin heldur størri enn higartil hildið. Tað er sama myndin sum í Japan og USA. Serfrøðingarnir vísa á, at amerikanski búskapurin fótaði sær rættiliga skjótt eftir atsóknirnar tann 11. september í 2001, og soleiðis var eisini í Bretlandi eftir bumburnar í London í næstsíðstu viku.

Samstundis siga tey serkønu, at týski búskapurin er við at koma á rætta kós, og at framgongdin har verður ætlandi størri enn higartil hildið. Hagtøl vísa, at týski ídnaðurin stendur seg væl í kappingini á altjóða marknaðinum, og tað hevur økt útflutningin meiri, enn roknað varð við.

## Turkaland fær krakk

Hóast ES-leiðararnir hava gjørt av at taka upp samráðingar við Turkaland um limaskap í samveldinum, vilja teir flestu ES-borgararnir ikki hava landið uppí.

Ein nýggj kanning hjá ES-nevndini avdúkar, at 52 prosent av teimum spurdu ES-borgarunum eru ímóti turkiskum limaskapi. Bara 35 prosent siga seg taka undir við, at Turkaland sleppur upp í samveldið. Serliga eysturríkarar, týskarar og fransmenn siga nei. Í Eysturríki siga heili 80 prosent, at tey vilja ikki hava Turkaland uppí, í Týsklandi siga 74 prosent tað sama, og 70 prosent av teimum spurdu í Fraklandi eru ímóti.

Størstu undirtøkuna fáa turkar í Bretlandi. og bretska stjórnin hevur eisini lagt stóran dent á at fáa Turkaland upp í ES. Jack Straw, uttanríkisráðharri, segði við Reuters í gjár, at Turkaland er ein partur av framtíðar Evropa.

## Skulu binda frið

Tann víðgongdi palestinski felagsskapurin Hamas hevur nú givið tilsøgn um at gevast við øllum vápnaðum tiltøkum í Gaza-geiranum.

Avtalan kom í lag týsdagin, eftir at tveir týðandi limir í Hamas fullu í slotbardaga við palestinsku løgregluna. Sambært avtaluni hevur Hamas eisini lovað at gevast við sínum rakettálopum á mál í Ísrael.

Tað hevur stóran týdning fyri teir palestinsku myndugleikarnar at fáa Hamas at binda frið. Um tríggjar vikur fara ísraelsmenn at flyta tey jødisku niðursetufólkini um Gaza-geiranum, og myndugleikarnir hava leingi stúrt fyri, at felagsskapir sum Hamas ætlaðu sær at órógva afturtøkuna. Ísraelska stjórnin hevur gjørt av at flyta niðursetufólkini úr øllum teimum 21 niðursetubygdunum í Gaza, og afturtøkan byrjar tann 15. august.

## Biddarar til arbeiðis

Biddararnir, sum plaga at ganga í gøtunum í miðbýnum í Oslo og biðja um pengar, hava nú fingið arbeiði.

Eitt felag kom herfyri við einum hugskoti um at geva eitt serligt biddarablað út, og hugskotið hevur víst seg at vera væl valt. Í blaðnum verður greitt frá øllum hugsandi viðurskiftum, sum hava samband við biddarar og heimleys, og evnið hevur víst seg at hava stóran áhuga ímillum fólk. Tann fyrsta útgávan bleiv prentað í 10.000 eintøkum, men tað var ov lítið, so nú er upplagið 15.000, skrivar Aftenposten.

Tað eru biddararnir, sum selja blaðið, og sjálvt um tað kostar 40 norskar krónur, keypa fólk tað fegin. Biddararnir fáa helmingin av pengunum, og teir eru ovurfegnir. Teir fegnast ikki bara um pengarnar, men siga, at teir kenna seg meiri verdar nú enn fyrr.

- Nú ganga vit og brosa, og fólk heilsa okkum, sigur ein av biddarunum við Aftenposten.

# Bush valdi sum væntað



*George W. Bush hevur gjørt av at tilnevna tann sera konservativa John Roberts dómara í hægstarætti*

**Fyri fyrstu ferð hevur George W. Bush tilnevnt ein dómara í hægstarætt, og valið bleiv, sum tey flestu høvdu væntað. Men minni enn so øll eru líka fegin um valið**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 1. juli fór Sandra O'Connor frá sum dómari í amerikanska hægstarætti. Hon bleiv tilnevnd fyri 24 árum síðani og er tann fyrsta kvinnan, sum hevur sitið í rættinum.

Tí vildu fleiri hava George W. Bush, forseta at tilnevna eina kvinnu í hennara stað. Eitt nú vildu fleiri republikanarar hava forsetan at velja eina kvinnu, og somu áheitanina fekk forsetin frá konu síni, skrivar AP.

Men valið fall á tann 50 ára gamla dómaran John Roberts. Hann hevur arbeitt fyri fleiri republikanskar forsetar fyrr. Eitt nú arbeiddi hann í løgmálaráðnum í forsetaskeiðinum hjá Ronald Reagan, og hetta starvið røkti hann eisini, tá George Bush, eldri var forseti.

Tey seinastu árini hevur John Roberts verið dómari í rættinum í Washington DC, og hann verður roknaður sum ein sera konservativur dómari. Eitt nú hevur hann verið talsmaður ímóti fosturtøku.

Kongressin skal góðkenna dómararnar í hægstarætti, og demokratarnir hava longu boðað frá, at teir hava fleiri spurningar í sambandi við tilnevningina. Demokratiski leiðarin í Senatinum, Harry Reid, segði í gjár, at forsetin hevur valt ein dómara við tí neyðuga løgfrøðiliga førleikanum, men at tað er ikki bara tað, sum hevur týdning.

Hetta er fyrstu ferð í ellivu ár, at amerikanski hægstirættur fær nýggjan dómara. Sjey av teimum níggju dómarunum vórðu tilnevndir, meðan Ronald Reagan var forseti. Starvið sum hægstarættardómari í USA eitt eitt lívsstarv.

Roknað verður við, at Bush skal tilnevna ein dómara afturat, tí tann 80 ára gamli rættarformaðurin, William Rehnquist, er sjúkur av krabbameini.

# Læknar í verkfalli at mótmæla harðskapi

**Læknarnir á einum sjúkrahúsi í Bagdad løgdu arbeiðið niður fyri at mótmæla harðrendu framferðini hjá hermonnunum**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Læknarnir á kvinnudeildini á Yarmouk-sjúkrahúsinum í Bagdad hava úr at gera, tí umframt teir vanligu sjúklingarnar skulu teir viðgera fólk, sum hava fingið skaða av bumbuspreingingum.

Men týsdagin løgdu teir arbeiðið niður. Teir vildu ikki góðtaka, at irakskir hermenn vóru komnir inn á sjúkrahúsið at rannsaka sjúklingar. Tá ein av læknunum royndi at verja sjúklingarnar, setti ein hermaður byrsu sína íímóti honum og hótti við at skjóta. Tá læknin kortini sýtti fyri at flyta seg, siktaðu fýra aðrir hermenn eftir honum, skrivar Reuters.

Slíkt vilja læknarnir á Yarmouk-sjúkrahúsinum ikki góðtaka, og týsdagin løgdu 30 teirra arbeiðið niður. Endamálið við arbeiðssteðginum var fyrst og fremst at mótmæla teirri harðrendu framferðini hjá teimum iraksku her-monnunum.

- Vit skilja væl, at fólk eru skelkað av avgerð okkara. Men vit hava eisini okkara rættindi, og vit tað sigur seg sjálvt, at vit kunnu ikki gera okkara arbeiði, um vit kenna okkum hóttar, segði læknin Assad Hindi.